# Lóg fyri Kórsamband Føroya
# (Broytt seinast á umboðsmannatingi 6. oktober 2013)

§ 1. **Kórsamband Føroya er meginfelag fyri føroysk kór.**

§ 2. Endamál kórsambandsins er at virka til frama fyri føroykst kórvirksemi. Hetta verður framt við:

1. At vekja og styrkja áhugan fyri kórsangi í Føroyum
2. At styrkja felagsskapin millum føroysku kórini, m.a. við árligu kórstevnuni.
3. At umboða føroykst kórvirksemi innan og uttanlands.

§ 3. **Limaskapur**

1. Øll kór í Føroyum kunna gerast limir í Kórsambandinum.
2. Limagjald verður ásett á árliga umboðsmannatinginum.
3. Limaskapur er bert galdandi, um limagjaldið er goldið seinast 1. mars sama ár.
4. Bert limakór kunnu luttaka á kórstevnu við egnari skrá.
5. Roknskaparár kórsambandsins gongur frá 1. juli til 30. juni. Roknskapurin verður grannskoðaður av 2 grannskoðarum, sum verða valdir á árliga umboðsmannatinginum.

§ 4. **Nevndin**

1. Kórsambandið verður stjórna av 4-mannanevnd. Nevndarlimir og 2 eykafólk verða vald á umboðsmannatingi.
   Tveir nevndarlimir verða valdir annaðhvørt ár. Eykafólkini verða vald á hvørjum ári.
2. Nevndin skipar seg við formanni, næstformanni, skrivara og kassameistara.
3. Nevndin heldur fund, tá formaðurin ella 2 nevndarlimir ynskja tað.
4. Nevndin er viðtøkufør tá minst 3 limir eru møttir. Stendur á jøvnum tá nevndin atkvøður, gevur formansins atkvøða meirluta.
   Nevndin kann leita sær ráð og stuðul hjá hjálparfólkum, sum ikki eru limir í nevndini.
5. Í samband við árligu kórstevnuna hevur Kórsambandið fíggjarliga og praktiska ábyrgd av musikalska innihaldinum.
6. Kórsamband Føroya skipar fyri kórsangi ólavsøkudag undir tinghúsinum.
7. Fundarfrásøgn frá nevndarfundum verður sett í gerðabók.

§ 5. **Umboðsmannating**

1. Hægsti mynduleiki kórsambandsins er umboðsmannatingið, sum verður hildið á hvørjum ári.
2. Á umboðsmannatingi kann hvørt kór verða umboða av 2 limum, treytað av at limagjald er goldið
3. Eykaumboðsmannating verður hildið um 1/3 av limakórunum krevja tað.
4. Fráboðan um umboðsmannating skal at verða send limakórunum ein mánað framanundan. Dagsskrá við uppskotum eigur at vera kórunum í hendi minst 7 dagar framanundan.

5. Regluliga umboðsmannatingið hevur hesa skrá:
   1. Val av orðstýrara og skrivara.
   2. Formansfrágreiðing.
   3. Grammskoðaður roknskapur fyri Kórsambandið og undanfarnu kórstevnu verður lagdur fram til góðkenningar
   4. Uppskot frá nevndini.
   5. Uppskot frá limakórumunum. Uppskot skula vera formanninum í hendi í seinasta lagi 14 dagar frammanundan, at tingið verður hildið.

6. Ásetan av limagjaldi
7. Val av 2 nevndarlimum og 2 tiltakslimum
8. Val av 2 granskoðarum.
9. Eftirmeting av kórstevnuni.
10. Ymiskt.

6. Fundarfrásøgn frá umboðsmannatinginum skal at verða send limakórunum.

§. 6 **Val og atkvøðugreiðsla**

1. Nevndarval fer fram við skrivligari atkvøðugreiðslu.